## Rás við skerdari skrá

Mánadagin yvirtók Miðlavarpið útvarpsstøðina Rás 2, og hesa vikuna verður tøknin flutt frá bygningunum hjá Rás 2 til studio hjá Miðlavarpinum í Havn og í Klaksvík. Hetta hevur við sær, at Rás sendir við skerdari skrá hesa vikuna. Bert tíðindi og tónleikur verða á skránni. Fríggjdagin verður yvirtøkan av Rás 2 markerað við móttøku í Miðlahúsinum í Vágsbotni, og mánadagin 8. oktober fer Miðlavarpið undir nýggja sendiflatu á Rás 2.

## Kemilux betri fyri til heilarloysnir

Fríggjadagin keypti p/f Kemilux allan partapeningin í smápartafelagnum Sirius. Sirius hevur verið heildarveitari av pakkitilfari og útgerð til ídnaðin. Fyrrverandi eigarin, Páll Kjærbo fer hereftir at starvast hjá Kemilux.
- Við hesum verður Kemilux uppaftur betri fyri, tá tað ræður um heildarloysnir, sigur Debes Petersen, stjóri í Kemilux Industri.

Skálaberg:

# Fyrsta skip í heiminum við BRC-góðkenning á A-stigi

**Herfyri hevði Skálaberg, sum fiskar í Barentshavinum, vitjan av trimum konufólkum, harav tvey teirra umboðaðu Det Norske Veritas. Skipið hevur nú sum fyrsta skip í heiminum fingið eina sonevnda BRC-góðkenning á A-stigi**



*- Vit kunnu siga, at Skálaberg við hesi góðkenning er forgangari á hesum øki, og spurningurin er, nær slíkar góðkenningar sum henda verða settar sum krøv til matvøruframleiðarar, sigur Drós í Ólavstovu*

GÓÐKENNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

"Ein lítil heilsan úr Barentshavinum. Veðrið er gott, men her er einki fiskarí..."

Soleiðis byrjar teldubræv, sum vit á Sosialinum fingu frá einum av manningini umborð á Skálabergi í síðstu viku.

### Kvinnulig vitjan

Næstsíðsta vikuskifti vóru tríggjar kvinnur á vitjan umborð á Skálabergi. Tvær teirra, Drós í Ólavstovu og Vibeke Bagger, umboðaðu Det Norske Veritas og Durita í Grótinum umboðaði JFK-Trol sum góðskustjóri.

Endamálið við ferðini var at kanna eftir, um Skálaberg nú lýkur tey krøv, sum Det Norske Veritas setir, um skipið skal kunna fáa eina sonevnda BRC-góðkenning á A-sigi.

Drós í Ólavstovu, sum hevur fyritøkuna Quality Consulting, arbeiðir í hesum sambandi fyri Det Norske Veritas og umboðar stovnin í sambandi við hesa góðkenning.

Quality Consulting hjálpir fyritøkum, sum arbeiða við matvøru og skipar eitt nú fyri skeiðum í matvørureinføri og matvørutrygd.

Nú Skálaberg, sum helst fyrsta skip í heiminum hevur fingið hesa BRC-góðkenning á A-stigi, hevur Drós sitið hinumegin borðið, sum umboðandi tann góðkennandi partin – og ikki tann ráðgevandi.

- Í hesum førinum hevur mín uppgáva soleiðis ikki verið ráðgevandi, men "dømandi", sum hon tekur til.

### Út við bátum

Drós og Vibeke umboðaðu soleiðis Det Norske Veritas, sum skuldi góðkenna ella vraka Skálaberg í sambandi við ætlaðu BRC-góðkenningina á A-stigi.

- Vit fóru úr Kirkenes í Noregi og sigldu haðani út til Skálaberg, sum fiskaði í russiskum sjógvi. Ferðin út á skipið og heimaftur tók umleið hálvan fjórða tíma hvønn vegin. Vit vóru umborð á skipinum í stívliga eitt samdøgur tilsamans.

Drós sigur, at tá ið allar kanningar umborð vóru lidnar, staðfesti Det Norske Veritas, at Skálaberg hevur fingið BRC-góðkenning á A-stigi.

- Mær vitandi hevur rækjuvirkið hjá O.C. Joensen á Oyri hesa góðkenning, men annars haldi eg ikki, at onnur virkir ella skip her um okkara leiðir hava hesa góðkenning.



*Her eru tær á veg umborð á Skálaberg, sum fiskar í russiskum sjógvi í Barensthavinum. Væl verður ansað eftir, at trygdin er í lagi*

### Bretskur standardur

Hon sigur, at BRC er ein bretskur standardur, sum kann brúkast um allan heim.

- Hetta er ein standardur, sum bretsku matvøruketurnar hava tikið seg saman um at gera, og hann fevnir um eina røð av tingum, sum skulu fylgjast – alt frá reinføri, framleiðslu til viðlíkahald, sigur hon.

Drós sigur, at henni kunnugt hava keyparar higartil ikki kravt, at matvøruframleiðarar skulu kunna skjalprógva ein BRC-standard, men hon heldur, at góðkenningin, sum Skálaberg nú hevur fingið, kann geva skipinum betri atgongd til eitt nú nýggj viðskiftafólk.

- Vit kunnu siga, at Skálaberg við hesi góðkenning er forgangari á hesum øki, og spurningurin er, nær slíkar góðkenningar sum henda verða sett sum krøv til matvøruframleiðarar.

### Gott vørumerki

Hon ivast onga løtu í, at ein slíkur standardur er eitt gott vørumerki at hava hjá einum framleiðara.

- Tað er nógv meira vanligt í øðrum londum, at fyritøkur, sum framleiða matvørur, hava góðkenningar av ymiskum slagi á sínum vørumerki, sigur Drós.

Hon vísir á, at nú verður arbeitt við at fáa allar ISO-góðkenningarnar lagdar í eina góðkenning, sum verður rópt ISO 22000.

- Endamálið við hesum er at gera tað einfaldari, so sleppast kann undan fleiri ymiskum iso-góðkenningum, soleiðis at vit fáa eina altjóða iso-standars á hesum øki, sigur Drós í Ólavstovu.



*Drós í Ólavstovu, Vibeke Bagger og Durita í Grótinum fóru til lands aftur við hesum bátinum hjá norska Redningsselskabet*